"Kjálkar, lippur, ræstur fiskur, upsastykkir við barbequesmakki ....fyrsta floks delikatessur!"

- fisk til døgurða minst eina ferð um vikuna!

www.fiskakeyp.fo

Á heimasíðu okkara finnur tú eitt stórt úrval av fiski og fiskaúrdráttum til matna. Og har finnur tú eisini døgurðauppskriftina!

Bíleggingarlisti liggur á heimasíðuni. Fyll út og send/faxa til okkara, so hevur tú vøruna við dyrnar 2-3 verkadagar aftaná. Tú kanst eisini ringja ordran inn á tlf. 21 53 35. Skjótt og ómakaleyst.

Sonni FISKAKEYP
690 Oyndarfjørdur
Tlf. 21 53 35
Fax 44 52 45

- tín fiskaveitari á alnótini

Tvingsilssøla

Fríggjadagin, 27. august 2004, kl. 10.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 560 a Froðba (AS nr. 2-12/2004).

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini sethús og er grundviddin 57 m² í fleiri hæddum og smb. tingbókini er økið, har húsini standa á stórt 615 m².

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Miðhæddin: køkur, 2 stovur, 1 sovikamar, 1 toilet v/ brúsu og ein gongd við trappu uppgongd og niðurgongd.

Loft: 4 kømur, 1 toilett.

Kjallarahæddin: er deild upp í 4 rúm umframt 1 rúm við egnari hurð.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 45376.01), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann 15. juli 2004

Tvingsilssøla

Fríggjadagin, 27. august 2004, kl. 10.30 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 1 k, Froðba (AS nr. 2-13/2004).

Sambært tryggingarskjalinum er talan um eini sethús, 135 kvm. í kjallara- og stovuhædd, gjørd av timbri og takt við jarni og smb. tingbóksattestini er økið, húsini standa á, til víddar 724 m².

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Miðhæddin: Køkur, durur, gongd, toilett v/ bað, fýra kømur, ein stova og ein hjallur.

Kjallarahæddin: Kjallarin er óinnrættaður.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 45618.01), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann 15. juli 2004

"Fráboðan um loyvi til aftursøkking"

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hin 16. juli 2004, við heimild í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum, hevur givið Nes kommunu loyvi til aftursøkking av tilfari

vestan fyri verandi grótkast við bátahylin, umleið á 62° 05,78' N og 06° 44,54' W

Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Loyvið liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Loyvið kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo .

Heilsufrøðiliga starvsstovan

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,-
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Óke ypis
Verður sent ópostað Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn: _____
Bústaður: _____
Postnr.: _____
Bygd/býur: _____
Telefon nr.: _____
Undirskrift: _____

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Tíðaravmarkað starv

Kateringleiðari

Við hesum verður eitt starv sum kateringleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins lýst leyst. Starvið er tíðaravmarkað til eitt ár, tó við møguleika fyri at blíva fast starv. Ynskiligt er, at viðkomandi kann byrja skjótast møguligt.

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyrli, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur, sum fyriskipað av leiðsluni. Arbeiðs- og vaktarskipanin verður fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.

Starvið fevnir um
Høvuðsuppgávan hjá kateringleiðaranum verður at tryggja, at veitt verður fyritøkuni ein úrslitagóð tænasta, herundir samskipan, viðlíkahald og menning av stýringini innan kateringøkið og at tryggja, at bæði manning og ferðafólk verða nøgd við tænastuna.

Kateringleiðarin fær eisini ábyrgdina av, at formligar reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir svara saman við málsetningin hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá kateringleiðaranum verða at:

- Planleggja og fyriskipa innkeyp av skipsvistum til fyritøkuna.
- Tryggja ein úrslitagóðan rakstur á kateringøkinum.
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar.

Førleikakrøv
- Vinnubrævur sum hovmeistari ella drúgvar royndir innan økið.
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð.
- Heilsuprógv.
- Sløkkiskeið.
- Teldukunnleiki á brúkarastøði.

Annars rokna vit við, at tú hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert kundavinalig/ur og røkin.

Setanartreytir
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvið er í lønarflokki 8, sum í løtuni er kr. 24.181,50 um mánaðin í byrjunarløn og 26.239,50 í endaløn. Harumframt verður latin ein viðbot á kr. 1.600,- um mánaðin.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin, 22. juli 2004. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, rakstrarleiðara, tel 54 30 41 ella e-post: rev@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ

PARKERINGSFORBOÐ

Porkeris Kommuna hevur samtykt at seta í verk parkeringsforboð í høgru vegsíðu frá húsunum hjá Sigurð Djurhuus og inn til húsini hjá Andrew Thomsen.

Forboðið verður sett í gildi mikudagin 21. juli 2004, kl. 06:00.

Porkeri, tann 16. juli 2004

PORKERIS BYGDARRÁÐ

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311728 - 611728 - Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Klinikkassistentur

Søkt verður eftir klinikkassistenti at byrja mánadagin 23. august 2004.

Talan er um fulltíðarstarv.

Við útbúgving hava fyrimun.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. august 2004.

Tannlæknastovan Hjá Unnur Jensen
Varðagøta 26
Box 3142 · 110 Tórshavn

Til Sølu

· 4x4 við setrum aftan · Km 92.600 · Bilurin er í sera góðum standi, og væl røktur · 16" alu-hjól · Sleipikrók · Boyla framman o.a.

Kr. 95.000,- Útgjald bert kr. 19.000,- restina práta vit um

Nógv onnur góð tilboð á Hjalla

Bilfriðkan
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
sí meira á www.bilfridkan.fo · landsins lagaligasta brúktbilafigging

Sosialurin 341800

FAROE LAW
bjóðar heimligar og altjóða loysnir
Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv
Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

Sálarfroðistovan
Hoyvíksvegur 65
Postboks 3134 · 110 Tórshavn
Bílegging av viðtalu kl. 8-9 gerandisdagar á tel 310335 annars á sjálvsvarara
Kári Leivsson
Auoriseraður sálarfræðingur
- Terapeutur IAP umfataður av sjúkrakassaóttmála

GEVIÐ BLÓÐ

P/f Jógvan Weihe
Heil- og smásøla
FØROYSK FLØGG
YMISKAR STØDDIR Á GOYMSLU
Sent verður um alt landið
Stiðjagøta 10 · Tel 35 38 97 · Fartel 21 38 97 · Fax 35 38 98
Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo
heimasíða: www.jogvan-weihe.fo

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Kontrollar!

Við ólavsøku-kappróðurin í fjør og sum hava áhuga at hjálpa okkum aftur í ár, verða **bidnir um at ringja á tlf. 213005 beinanvegin.**

Havnar Róðrarfelag